# Tey lítlu gevast

**Tey trý fíggjarliga veikastu formel 1 liðini Minardi, Jordan og Sauber koyra sunnudagin seinastu formel 1 koyringina.**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Tey trý lítlu formel 1 liðini Minardi, Jordan og Sauber koyra sunnudagin sína seinastu koyringn. Minardi hevur verið í formel 1 í 22 ár, Jordan í 15 ár og Sauber í 13 ár. Jordan er tað av liðunum, ið hevur klárað seg best, við fýra sigrum, er hetta einasta av hesum trimum liðum, sum hevur vunnið eina koyring, í kappingini um heimsmeistaraheitið í formel 1.

### Funnu Schumacher

Hóast liðini ikki hava kappast um heimsmeistaraheitið hava tey spælt ein stóran leiklut í at gera formel 1 til tað, sum tað er. Hetta eru trý lið, sum hava funnið koyrar sum Allesandro Nannini, Alex Zanardi, Michael Schumacher, Fernando Alonso, Giancarlo Fisichella, Kimi Raikkonen, Jarno Trulli, Felipe Massa, Rubens Barrichello, Eddie Irvine, Heinz Harald Frentzen, Ralf Schumacher og Takuma Sato. Hesar stjørnur hava í hesum liði fingið fyrsta møguleikan at koyra í formel 1. Tilsamans hava hesir koyrar vunnið 136 formel 1 koyringar.

Men frá næsta kappingarárið eru Jordan - Midland Racing, Minardi - Red bull II og Sauber eitur BMW.

### BAR verður Honda

Umframt hetta hevur Honda keypt partabrøvini í BAR-Honda frá British American Tobacco, og hetta liðið skiftir navn til Honda næsta kappingarár. Hetta er sostatt endin á British American Racing, ið byrjaði í formel 1 við, við at siga, at tey fóru at vinna fyrstu koyringa av fyrstu byrjunarstøðu, og gerast heimsmeistarar fyrsta árið. Hóast liðið gjørdist nummar tvey í kappingini um heimsmeistaraheitið í fjør, hava tey onga koyring vunnið hesi fimm árini í formel 1.

### Enn eitt lið

Leysasøgur hava gingið um, at McLaren Mercedes skuldi hava eitt eykalið næsta kappingarár, men hetta sær ikki út til at vera satt. Tó verður eitt ellinta lið við næsta kappingarár, og Honda skal lata motorar til liðið. Gitingar eru frammi um, at hetta verður eitt japanskt lið, ið fyrrverandi formel 1 koyrarin Aguri Suzuki stendur aftan fyri, somu søgur siga, at Takuma Sato skal koyra fyri hetta liðið næsta kappingarár.

## Støður

**HM fyri koyrarar**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fernando Alonso | 123 |
| 2 | Kimi Räikkönen | 104 |
| 3 | Michael Schumacher | 62 |
| 4 | Juan-Pablo Montoya | 60 |
| 5 | Giancarlo Fisichella | 53 |
| 6 | Jarno Trulli | 43 |
| 7 | Ralf Schumacher | 39 |
| 8 | Rubens Barrichello | 38 |
| 9 | Jenson Button | 36 |
| 10 | Mark Webber | 34 |

**HM fyri lið**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Renault F1 | 176 |
| 2 | McLaren-Mercedes | 174 |
| 3 | Scuderia Ferrari | 100 |
| 4 | Toyota Racing | 82 |
| 5 | Williams-BMW | 64 |
| 6 | BAR Honda | 37 |
| 7 | Red Bull Cosworth | 30 |
| 8 | Sauber Petronas | 17 |
| 9 | Jordan Toyota | 12 |
| 10 | Minardi Cosworth | 7 |

Áðrenn Shanghai:

# HM-kappingin fyri lið verður avgjørd

**Koyringin á Shanghai breytini í Kina er seinasta formel 1 koyringin á árinum**

FORMEL 1
*Niels Uni Dam*

Hetta er nítjanda koyringin í ár og hetta er met. Og enn er kappingin um heimsmeistaraheitið fyri lið víðopin.

McLaren-Mercedes mistu oddasessin í hesi kapping í seinastu koyring, tá Jaques Villeneuve kroysti McLaren-Mercedes bilin hjá Juan Pablo Montoya av breytini, so sjálvt um liðfelagin hjá Montoya Kimi Räikkönen vann á Suzuka breytini í seinastu viku, so gjørdu Renault bilarnir á øðrum og triðja plássi ikki mætari enn, at endurvinna oddasessin í kappingini fyri lið, ein sess sum Renault hevði havt alt árið. Renault hava nú 176 stig móti teimum 174 hjá McLaren-Mercedes.

### Räikkönen er sera kvikur

Avbera flotta koyringin hjá Kimi Räikkönen á Suzuka, har hann koyrdi av seytjandu byrjunarstøðu upp at taka oddasessin frá Giancarlo Fisichella í Renault, vísti, at McLaren hava bilin, sum smyr øll og alt av. Meðan Alonso, ið fór av sekstandu byrjunarstøðu upp á triðja pláss, vísti koyring í heimsflokki. Hóast koyringin á Suzuka telist millum tær mest spennandi í nýggjari tíð, gjørdist tað ongantíð teir stóru nærdystirnir millum Alonso og Räikkönen, sum formel 1 verðin hevur bíða eftir í alt ár. Vit kunnu vóna, at hetta verður koyringin, har teir báðir sum eru nummar eitt og tvey í kappingini um heimsmeistaraheitið fyri koyrarar bresta saman.

### Ferrari halta

Í fjør varð koyrt á Shanghai breytini á fyrsta sinni, Rubens Barrichello í Ferrari vann, men í ár er nokk lítil ivi um, at Ferrari ikki fer at blanda seg í stríðið um fyrsta pláss, Rubens megnaði ikki frægari enn ellinta pláss á Suzuka, og liðfelagin sjeyfaldi heimsmeistarin Michael Schumacher stríddist har fyri at fáa sítt sjeynda pláss.

### Seinasta koyringin hjá BAR

Mest skuffandi framførslan á Suzuka stóu BAR-Honda fyri. Takuma Sato vísti enn einaferð sína verstu síðu, tá hann rendi á Jarno Trulli og varð diskvalifiseraður á heimabreytini. Nógv rok hevur verið um hesa hending, og leingi sá tað út sum, um royndarkoyrarin hjá BAR-Honda Anthony Davidson skuldi koyra í staðin fyri Sato í Kina. Men ósemjan er av, og Sato koyrir sambært F1.com í hesi, síni síðstu koyring fyri BAR-Honda.

Jenson Button, ið byrjaði av aðru byrjunarstøðu og var eitt av bestu boðunum um ein vinnara, megnaði slettis ikki at fylgja við, og endaði ikki frægari enn á fimta plássi. Í fjør stríddist Jenson Button við Rubens Barrichello og Kimi Räikkönen um sigurin, og teir endaðu við 1,4 sekundum millum fyrsta og triðja pláss.

### Alt kann henda

Við bert einari viku millum koyringarnar, og øllum liðunum í fjareystri langt frá royndarbreytunum og sínum høvuðssætum, er ivasamt um har verða stórar broytingar í hvussu bilarnir klára seg. Men hetta er jú formel 1, og alt kann henda.

## FAKTA

### Um kinversku koyringina á Shanghai




**Umferðir:** 56
**Breytarlongd:** 5,451 km
**Skjótast umferð:** Michael Schumacher 2004 (Ferrari)1 minutt 32,238 sekund
**Longdin á koyringini:** 305,066 km
**Núverandi koyrari sum hevur vunnið á Shanghai:** Rubens Barrichello 2004 (Ferrari)
*Keldur: www.f1.com og www.forix.com*

# Tølini tala

| | 05 | 04 | 03 | 02 | 01 | 00 | 99 | 98 | 97 | 96 | 95 | Í alt | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| HB-KÍ | - | 1-1 | 3-2 | 4-1 | 1-2 | 1-0 | 1-2 | 4-0 | 3-0 | 3-3 | 5-0 | 6-2-2 | 26-11 |
| NSÍ-ÍF | 1-1 | 1-2 | - | - | - | - | 0-0 | 1-1 | 2-4 | - | - | 0-3-2 | 5-8 |
| TB-VB | - | - | - | 1-0 | - | - | - | 0-0 | - | 3-2 | 2-0 | 3-1-0 | 6-2 |
| EB/S-Skála | 0-0 | 0-1 | 1-0 | 1-0 | - | - | - | - | - | - | - | 2-1-1 | 2-1 |
| GÍ-B36 | - | 0-1 | 1-4 | 2-2 | 3-1 | 1-0 | 2-1 | 5-2 | 0-2 | 3-0 | 2-0 | 6-1-3 | 19-13 |

TB og ÍF tykjast vera liðini, sum í størstan mun hava hagtølini í sín part undan vikuskiftinum. Í øllum førum hevur ÍF altíð havt okkurt við sær, tá teir fara úr aftur Runavík, og á Sevmýru hevur VB ikki fingið fulla úrtøku. Í øllum førum ikki seinasta tíggju ára skeiðið.

Annars er vert at leggja til merkis, at hóast GÍ-yvirvág móti B36, so hevur B36 ikki tapt í Gøtu síðani 20001, og í Havn hevur HB eftir hondini gott tak á KÍ, sum tó hevur argað nakað.

Talvan sýnir, hvussu mótstøðuliðini sunnudagin hava staðið seg í tilsvarandi uppgerðunum seinastu tíggju árini.